Um fyrilestrahaldararnar á Aliráðstevnuni 2016

Ragnar Nystøyl, Kontali Analyse

<u>Marknaðarútlit fyri alivinnuna</u>

Ragnar Nystøyl er stjóri í norsku greiningarfyritøkuni Kontali Analyse, sum m.a. ger greiningar av havbúnaði í Noregi og aðrastaðni. Ragnar Nystøyl fer at leggja fram um marknaðarútlitini fyri laks, og hann fer eisini at samanbera úrslitini hjá føroysku alivinnuni við úrslit aðrastaðni.

Rúni Dam, Avrik

<u>Fiskagoymsla og metingar</u>

Rúni Dam er stovnari og eigari av fyritøkuni Avrik, sum m.a. framleiðir hagtøl til føroysku alivinnuna. Rúni fer at leggja fram hagtøl um fiskagoymslurnar og metingar um gongdina, og fer eisini at leggja fram besta úrslit fyri 2015.

Bjørn Kunoy, Sendiharri Føroya í Russlandi

<u>Russiski marknaðurin og virksemið hjá sendistovuni</u>

Føroyar hava í 2015 latið upp sendistovu í Moskva, og Bjørn Kunoy hevur røkt starvið sum sendiharri síðani hon lat upp. Bjørn fer í framløguni at greiða frá um russiska marknaðin og virksemið hjá sendistovuni.

Bjørn hevur doktaraprógv í almennari lóg og hevur síðani 2007 arbeitt í uttanríkistænastu í Føroyum, har hann einamest hevur arbeitt við havrætt og handilsrætt.

Marit Stormoen, Marine Harvest ASA

<u>Lúsastrategiin hjá Marine Harvest</u>

Marit Stormoen er djóralækni hjá Marine Harvest, og er leiðari fyri verkætlan um fiskaheilsu. Marit fer at greiða frá um nýggju lúsastrategiina hjá Marine Harvest, sum hevur fingið nógva umrøðu.

Marit hevur eina bakgrund sum PhD í epidemiologi frá Norges Veterinerhøgskole við fokus á laksalús og PD.

	Sigurd O. Handeland, Bergen University **<u>Framleiðsla av stórum smolti - ljósstýring</u>** Sigurd O. Handeland er granskari á Universitetinum í Bergen við fokus á havbúnað. Sigurd hevur m.a. granskað í týdninginum av ljósstýring, tá man framleiðir stór smolt, og fer á aliráðstevnuni at leggja fram um júst hetta evni.
	***Dr. Paul J. Midtlyng, Aquamedic*** **<u>Aling av resistentum laksalús í Noregi</u>** <u>*eitt lærudømi, hvussu man ikki skal gera*</u> Paul hevur arbeitt innan sjúkufyribyrging í havbúnaði síðan 1983. Hann fer á aliráðstevununi at greiða frá, hvussu viðgerðir móti laksalús hava ávirkað resistensin í norskum havbúnaði. Hann hevur m.a. arbeitt hjá VESO, Veterinærhøgskolen í Oslo, og Novartis Animal Health. Í løtuni eigur hann ráðgevingar-fyritøkuna Aquamedic, og granskar í sjúkufyribyrging.
	Kirstin Eliasen/Ása Johannesen, Fiskaaling **<u>Hvussu fáa vit mest burturúr rognkelsum í aliringunum</u>** Kirstin Eliasen og Ása Johannesen starvast hjá Fiskaaling, har tær m.a. hava kannað atferð hjá og nýtslu av rognkelsum sum part av lúsaniðurberjingini. Á Aliráðstevnuni fara tær at leggja fram um tær royndir, sum eru gjørdar við rognkelsunum higartil í føroyskum havbúnaði.
	Heðin Abrahamsen/Knud Simonsen, Fiskaaling **<u>Aling á harðbalnum økjum: atferð hjá nót og fiski</u>** Heðin Abrahamsen og Knud Simonsen starvast hjá Fiskaaling, har teir m.a. hava kannað, hvussu tað ávirkar nót og fisk at flyta longur út, har umstøðurnar eru meira harðbalnar. Teir fara á Aliráðstevnuni m.a. at greiða frá hvussu høg alda ávirkar nót og fisk.

Havbúnaðar felagið
FAROESE FISH FARMERS

	Esbern Patursson/Tróndur Kragesten, Fiskaaling **<u>Spjaðing av lús í Føroyum</u>** Esbern Patursson starvast hjá Fiskaaling og Tróndur Kragesten hevur júst vart sína Msc-ritgerð frá DTU um spjaðing av laksalús í Føroyum. Teir báðir fara á Aliráðstevnuni at leggja fram úrslitini frá verkætlan um spjaðing av laksalús.
	Rúni Weihe, Havsbrún **<u>Er gagnnýtslan av marinum rávørum í laksaaling ein skilagóð matvøruframleiðsla?</u>** Rúni Weihe er deildarleiðari á fóðurdeildini hjá Havsbrún, har hann eisini fæst við gransking og menning. Rúni hevur kannað nýtsluna av marinum rávørum í framleiðsluni av laksafóðri, og nýtir hesa gransking til at svara spurninginum, hvørt nýtslan av marinum rávørum er ein skilagóð matvøruframleiðsla.

Havbúnaðarfelagið
FAROESE FISH FARMERS